# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Framsýning í Listaglugganum

Fríggjadagin letur upp nýggj listaframsýning í Listaglugganum í Niels finsensgøtu 25.

Tey ið sýna fram eru: Halldis Olsen, Jóhan Martin Christiansen og Jóannes Lamhauge.

Halldis Olsen (f. 1983) sýnir fram grafisk verk. Halldis er undir útbúgving í London á Middlesex University.

Jóannes Lamhauge (f. 1985) sýnir fram málningar og er eisini undir útbúgving í London á Univesity of Kent. Jóannes lesur religiónsfilosofi.

Jóhan Martin Christiansen (f. 1987) sýnir fram tekningar, fotocollage umframt eina sokallaða videoinstallatión. Jóhan Martin er undir útbúgving í Danmark á Listahøjskolen á Ærø. Jóhan Martin er í løtuni við á várframsýning á Charlottenborg í Keypmannahavn.

Framsýningin letur upp fríggjadagin kl. 15.




*Listafólkini Jóhan Martin Christiansen og Halldis Olsen. Jóannes Lamhauge vantar á myndini.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Masterprógv á Søgu- og samfelagsdeildini

Týsdag 31. mars fekk Joan Ólavsdóttir prógv sum mastari í stjórnmálafrøði, aftan á at hava hildið almennan fyrilestur við støði í sínari ritgerð Føroyar í uttanríkispolitikki.



*Á myndini: Jóan Pauli Joensen, rektari, Beinta í Jákupsstovu, vegleiðari, Joan Ólavsdóttir M.S.Sc, Rolf Guttesen, próvdómari, Elin Súsanna Jacobsen, dekanur á SSD, Jens Christian Svabo Justinussen, vegleiðari. Árni Ólafsson, sum var próvdómari av ritgerðini, vantar á myndini*



# Øssur Mohr í Galleri Rødhusgaarden

Føroyski listamaðurin Øssur Mohr hevur framsýning í Galleri Rødhusgaarden við nýggjum oljumálningum, har myndevnið er føroyska náttúran við okkara skiftandi veðurlagi.

Fernisering verður leygardagin 4. april 2009 kl. 13.00 í gallarínum, har m.a. Karsten Lauritzen, fólkatingslimur heldur talu. Eisini verður tónleikur við Lisbeth Kjærulff og Maren Marie Tange.

Framsýningin verður opin frá 4. april til 3. mai. Opið er í páskavikuni og í komandi vikuskiftum frá kl. 11 – 17. Adressan hjá Galleri Rødhusgaarden er: Kystvejen 91, Rødhus · 9490 Pandrup

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Mariu Winther úr Vági**, fer frá kapellinum á Tvøroyrar sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14. Tey ið ynskja at minnast Mariu kunnu lata kirkjukórinum Ljómur eina peningagávu konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Mia Godtfred úr Vági**, búsitandi í Havn, andaðist mánadagin, 94 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin kl. 13.

†

Okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Mia Godtfred**

andaðist mánadagin 30. mars, 94 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin 3. apríl kl. 13.00.

**Gunnvør, Bergur, Bogi og Selma**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálptu til á ymsan hátt, tá kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

**Herborg Strøm**

doyði og varð jarðað.
Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávu til Eldrasambýlið í Vági.
Serliga takka vit starvsfólkunum á Eldrasambýlinum og Kirkjukórinum Ljómi.

*Familjunnar vegna*
**Torgir, Marita, Jonhild, Hans Pauli og Maria**

**Dagurin**
**2. apríl. Teodosius.** Kann vera navnið á rómverska keisaranum Teodosiusi Stóra, sum doyði í 395. Men teir halda, at líka skjótt hevur dagurin navn eftir kristnari gentu Teodosiu, sum varð tikin av døgum umleið ár 300. Viðhvørt verður hesin dagurin róptur Teodorius. Jóhannes av Skarði doyði hendan dagin í 1999.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*